FYLGISKJAL 3

LM-050/2025

Hoyringssvar til miðlastuðulslógina
8. oktober 2025

Fyrst er at siga, at tað er gleðiligt, at broytingar verða gjørdar í miðlastuðulslógini, sum seinastu árini púra greitt ikki hevur riggað.

Í nýggju lógini verður lagt upp til at rakstrarstuðulin fer upp á 60 prosent og ein nýggjur íverksetarastuðul kemur og verður heili 40 prosent.

Hetta halda vit vera eina háðan móti verandi miðlum. At ein nýggjur miðil skal kunna móttaka knappar tvær milliónir árliga frá landinum í tilsamans fimm ár er á ongan hátt gagnligt eftir okkara tykki.

Vit halda, at landið uppá hendan mátan tekur grundarlagið undan hinum føroysku miðlunum, sum hvønn dag av øllum alvi royna fáa rakstur í síni feløg.

Í lógini verður sagt, at ein rímilig orsøk skal vera til at halda, at miðilin skal kunna bera seg fíggjarliga tá tíðin er av. Vit trúgva einki uppá, at ein miðil, sum er fitaður upp av almennum pengum í fimm fylgjandi ár, fer at klára seg tá tilsagnarskeiðið er av.

Um politiska skipanin partú ynskir ein nýggjan miðil, halda vit, at prosenttalið skal setast niður á 10 prosent av samlaðu játtanini. Á tann hátt verður hesin nýggi miðilin heldur ikki so tengdur at almennari fígging og hevur harvið størri møguleika at yvirliva eftir, at tilsagnarskeiðið er av.

Um miðlastuðul sum heild er at siga, at miðlastuðulin síðan hann kom í gildi - hóast vaksandi upphæddir - als ikki hevur styrkt miðlalandslagið. Heldur hinvegin er orkan hjá privatu miðlunum minkað í stórum stíli seinastu árini.

Vinarliga
Portal.fo
Sverrri Eghom
ábyrgdarstjóri